## Hvat heldur fólkið handan diskin um uppskotið?



**Navn: Anna Maria Olsen**
**Starv: 17 ár í Miklagarði**

*Hvat heldur tú um nýggja uppskotið um upplatingartíðir?*
– Eg haldi, at hatta líkist ongum. Hatta kunnu teir ikki gera. Sum er arbeiði eg fullan dag aðruhvørju viku, og hálvan dag aðruhvørju viku. Eg orki so ikki at arbeiða nógv meiri enn tað. Teir kunnu ikki spreingja arbeiðsfólkið soleiðis, tað ber slett ikki til.
*Væntar tú at lógin kemur í gildi?*
– Ja, hon kann gott koma í gildi, men arbeiðsgevarin má ansa væl eftir ikki at pressa okkum meiri!



**Navn: Anja Mouritsen Müller**
**Starv: Júst byrjað sum lærlingur í Deres**

*Hvat heldur tú um nýggja uppskotið um upplatingartíðir?*
– Hatta er sikkurt gott fyri handilin. Men hatta er ringt fyri arbeiðsfólki. Eg vænti at hatta fer at føra til størri útskifting av starvsfólkinum. Vit mugu eisini hava fleiri arbeiðsfólk, sum kunnu býta vaktirnar ímillum sín, tí eg veit, at eg hevði so ikki orkað at staði her so leingi hvønn dag. Og tað trúgvi eg ikki, at nakar hevði.
*Væntar tú at lógin kemur í gildi?*
– Eg veit ikki ordiligt



**Navn: Elvira Thomsen / Sólvá Thomassen**
**Starv: 8 mánaðir / 3 dagar í Grifflinum**

*Hvat halda tit um nýggja uppskotið um upplatingartíðir?*
– Sum er arbeiða vit 9-18, og tað er leingi. Alt annað verður for leingi at skula arbeiða. So mugu vit í øllum førum hava fleiri starvsfólk og fleiri vaktir.
Eg rokni ikki við, at sølan fer at økjast nakað serligt, sjálvt um vit lata upp fyrr, og lata aftur seinni. Tí so koma fólk bara seinni um kvøldið. Tey koma sum oftast áðrenn vit stongja, so verður tað bara útsett nakrar tímar.
Hatta er eisini sera ópassandi fyri tey, sum hava børn. Hvat skulu tey gera við børnini ímeðan tey arbeiða?
*Vænta tit, at lógin kemur í gildi?*
– Nei, tað vænta vit ikki. Eingin kjansur!



**Navn: Rannvá Skorá**
**Starv: 1 ár hjá Gunnleivi á Hoyvíksvegnum**

*Hvat heldur tú um nýggja uppskotið um upplatingartíðir?*
– Vit hava opið frá 6.45-23 og tað er ivaleysa leingi. Eg hevði so ikki tímað at arbeitt her um náttina. Summi fara nokk at tíma tað, men tað verða nokk fleiri, sum ikki fara at tíma. Tað verður nokk heldur ikki tað stóra at gera um náttina...
*Væntar tú, at lógin kemur í gildi?*
– Nei, eg trúgvi ikki.



**Navn: Elsa Berg / Katrin Danielsen**
**Starv: 1,5 mánaða / 3 ár á Statoil í Gundadali**

*Hvat halda tit um nýggja uppskotið um upplatingartíðir?*
– Tað er sikkurt fínasta slag, at man kann keypa døgnið runt. Men spurningurin er, um nakar er uppi um náttina. Man kundi kanska havt longri opið, til uml. 01-02 tíðina um náttina, men tað verður sikkurt ringt at fáa fólk til tær vaktirnar. Í vikuskiftinum kundi man kanska havt opið um náttina, men tað høvdu nokk verið nógvir trupulleikar av fullum fólki, sum komu oman frá dansinum í Batmintonhøllini.
– Eg veit, at tey gera tað niðri, men eg hevði ikki tímað at arbeitt um náttina. Eg rokni heldur ikki við, at vit høvdu selt serliga nógv. Tey flestu sum arbeiða her ganga í skúla, so tað verður nokk ringt at fáa fólk at arbeiða.
*Vænta tit at lógin kemur í gildi?*
– Nei, tað rokni eg ikki við

**eys**

Smáhandlarnir í Føroyum kunnu hava:

# Opið 24 tímar um døgnið alt árið



*Nýggja uppskotið verður gott fyri vanliga føroyingin, sum nú sleppur at keypa tá hann vil. Men starvsfólkini í handlunum gleða seg ikki*

**Endamálið við nýggja uppskotinum, sum Vinnumálaráðið, við Bjarna Djurholm á odda, júst hevur latið úr hondum, er at dagføra upp- og afturlatingarlógina og at gera hana greiðari. Núverandi lóg er ótíðarhóskandi verður hildið, og handilsvinnan sjálv hevur fleiri ferðir funnist at henni**

HANDILSLÍV
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Nýggja lógaruppskotið fer at geva handilseigarunum størri frælsi, við tað, at tíðin, har handilin kann hava opið, at kalla er óavmarkað. Allir vanligir handlar kunnu nú nærum hava opið so galið teir vilja. Og talan er um allar handlar, frá skóm til mat til vaskimaskinur.

### Bert stongt sunnudag

Einasta krav er, at handlarnir skulu hava stongt frá kl 23.00 leygarkvøld til kl 06.00 mánamorgun.

Allir vikudagar eru sostatt púrasta uttan afturlatingarmark. Ynskja teir tað, kunnu handilseigararnir hava opið frá mánamorgni kl 06.00 og líka inntil fríggjakvøld kl 23.00. Uttan nakrantíð at steingja handilin.

Flaggdag og Grundlógardag skal steingjast kl 12.

Halgidagar og jólaaftan skal vera stongt.

Ein sunnudag um árið er loyvt at hava opið, og tað er seinasta sunnudag undan jólum, tá loyvt er at hava opið frá kl 14.00 - kl 23.00.

### Nógv undantøk

Tá tað so er staðfest, kunnu vit hyggja at listanum við undantøkum.

- Allir smáir handlar, ið selja gerandisvøru t.v.s. mat, avísir, reinførðisvørur, góðgæti o.s.fr. Einasta krav er, at handilin ikki er størri enn 250 m2.
- Bensinstøðir
- Blómuhandlar
- Handlar í framsýningarhølum
- Handlar á flogvøllinum
- Apotek og handkeypssølur á apotekum
- Automatir

Allir omanfyri nevndu handlar eru undantiknir afturlatingarlógini. Teimum nýtist sostatt ongantíð at steingja, hvørki um náttina, um vikuskiftið ella á heilidøgum.

So eftir 1. apríl 2005 verður møguligt hjá føroyingum at keypa gerandisvørur 24 tímar um døgnið 365 tímar um árið.

## Brot úr lýsingini av uppskotinum

… Mett verður, at tíðin í roynd og veru fyri langari tíð síðan er farin frá afturlatingarlógini, sum vit kenna hana. Stórar broytingar eru farnar fram í arbeiðs- og familjumynstrinum í samfelagnum tey seinastu ártíggjuni.

Fáa familjurnar í størri mun enn higartil møguleika fyri at handla, tá ið tað liggur best fyri hjá teimum, verður tað lættari at fáa gerandisdagin at hanga saman. Brúkararnir kunnu velja at fara til handils aðrar tíðir á degnum, enn – sum vanligast er – beint eftir arbeiðstíð og í sama tíðarbili, sum børnini skulu heintast í vøggustovu ella barnagarði, og matur skal gerast.

Somuleiðis kann ein tillaging av handilstíðini merkja at tað verður minni trýst á handlarnar ávísar tíðir. Hetta hevur so aftur við sær, at tað verður lættari at handla, og at tann einstaki brúkar minni tíð uppá hvørt keyp.

Longri upplatingartíðir hjá handlunum kunnu fáa sum avleiðing, at partur av teimum, sum starvast í handlunum, fáa óhøgligar arbeiðstíðir. Hetta kann gera tað truplari hjá nøkrum teirra at sameina familju- og arbeiðslívið, og t.d. at fáa børnini ansað. Kanningar aðrastaðni vísa tó eisini, at tey, sum arbeiða parttíð, eru betur nøgd við arbeiðsumstøðurnar enn tey, sum arbeiða fulla tíð.

Her skal leggjast afturat, at tey, sum arbeiða parttíð, júst eru tey, sum oftast arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð…

**eys**



UMMÆLI

# Elisa í London – Elisa í ævintýrlandi

**Gulla Øregaard**
*Tórshavn hin 22. nov. 2004*





Tá listafólkini Eir í Ólavstovu, Bjørg Mohr Andersen og Hallur Thomsen frá Sjónvarpi Føroya sleppa frá dagliga strevinum við myndatólinum og taka myndatólið til hjarta og kenslu, tá hendir verunliga nakað, sum gevur uppliving.

Tað kennist, sum um tey skapa filmslist á dokumentarøkinum.

Tað er, sum um myndatólið, ljósið og ljóðið renna saman í eina heilskapaða eind, har persónurin, sum verður lýstur, stendur skarur og reinur fyri áskoðaranum. Tú ert eitt sindur í iva um sendingin »Tú mást tola eitt nei« er dokumentar ella fiktión.

Sendingin um Elisu Heinesen hevur heitið »Tú mást tola eitt nei«. Tú varnast tað góða sambandið millum heitið og kvinnuna, sum sigur frá sínum ævintýri í London. Klippingin við krossandi myndum er løtt sum ein ballet.

Vit síggja Elisu gjøgnum ein myndavev, har vovnir verða dreymar, sum Shakespeare onkustaðni hevur tikið til.

Myndasøgan um Elisu í stóru verð er so væl gjørd, at tað er ein fragd at síggja og uppliva okkara tá ið filmsliðið gera listarliga munin.

Sunnukvøldið 21. nov. í bestu senditíð sóu vit Elisu Heinesen í London.

Vit uppliva London við høgum pulsi, sum stórbýurin er kendur fyri, og vit síggja skapandi Elisu í eini verð, har framtíðin var í gjár, og har ferðin er líka týdningarmikil at fyrihalda seg til, sum tað er at minnast til at anda.

Filmurin um Elisu vísir eitt gávuríkt listafólk, sum við vónum og sjónum sniðgevur/designar klædnapløgg til ungar kroppar og framtíðar dreymar um løtur í »glamour«.

Serliga spennandi er Elisa við sínum jarðbundnu meiningum um tað at røkka málum við síni stremban.

Eisini gevur filmurin áskoðaranum gjøgnum vinkonur og arbeiðsgevara eina mynd av eini kvinnu, sum er sera álvarsom við sínum listarliga ítrívi at skapa klæði og gera royndir at skilja fólkini í tíðini og í klædnaídnaðinum.

Elisa velur vinkonur frá kosmopolitiska umhvørvinum í milliónabýnum London Hetta sær út til at vera eitt stimbrandi umhvørvi við ymsum mentanum.

Vinkonurnar geva kvinnuni frá »heimsins nalva«, sum abbin doypti Tórshavn, mótspæl og moralskan stuðul.

Vit síggja og hoyra Elisu í ymsum arbeiðsumstøðum, og allastaðni merkir tú eina stinna virkna unga kvinnu. Hon er ikki bara til. Hon er rættuliga nærverandi í stórbýnum London, og kundi tískil verið uppvaksin har.

Tónleikurin er væl valdur til ymsu løtumyndirnar av Elisu, har hon við ferð stðrir gjøgnum bðin. Full av sjálvsáliti. Hon hevur tað neyðuga í skjáttuni, og tað er vitanin, at hon veit hvat tað vil siga, at verða miðvís og at útvega úrslit.

Hon sigur einastaðni, at sjálvandi má hon lurta eftir, hvat tey, sum bíleggja hennara vøru hava upp á hjarta, men innast inni veit hon, at hon gongur sínar egnu vegir. - Hugsaði, tá ið eg hoyrdi hana, at tað er ikki ókent, at listafólk hvørki kunna, duga ella vilja ganga gøtuna, sum onnur hava stungið út. - Fyrr verður teinurin gingin fleiri ferðir, fyri at leggja tað eftir seg, sum er tað unika. - Tað serliga!

Havi innan fyri eitt døgn sæð filmin tvær ferðir.

Fyrsta sýning í gjárkvøldið var við tónleiki, ljóð- og myndlist frá stórbýi. Frá heimbýli við klippistovu og aftur til náttarmyndir frá London by night.

Í kvøld var filmurin endursendur, og eg skrúvaði ljóðið fyri, meðan eg hoyrdi Johannes Møllehave tosa við Leif Láadal um Hans Christian Andersen og hansara stórfingnu ævintýr.

Fekk hugsanina, at alt hongur saman - Síggi fyri mær, at H. C. Andersen verður fluttur fram til ár 2004 og hann hittir Elisu Heinesen í London.

Tey bæði fara spákandi oman á Piccadilly Circus, har tey seta seg á ein bonk. Hann byrjar at lesa ævintýr fyri Elisu - Hon situr og gloymir seg burtur.

Elisa í London skapar skreyt og stás og fær okkum at droyma stórar dreymar um vakurleika og veitslur í farnari og komandi tíð. H. C. Andersen lesur so leingi, at tey bæði hava gloymt, hvar tey eru stødd, tá ein reyður dupultbussur koyrir framvið, og tey varnast, at tey mugu fara hvør til sín.

Hann fer aftur til friðin, og hon aftur til býin.

Filmsfólkini í Vørðsluni skaptu hugmyndina um Elisu og H. C Andersen í London.

SVF hevur seinastu tíðina gjørt mentunarsendingar, sum hava havt meira flog. Hetta ger okkum áskoðarar medvitandi um, hvussu nógv skal til, fyri at gera mun. Vónandi fara játtandi myndugleikar at síggja tað neyðuga í at skapa fortreytirnar fyri arbeiðinum. - Stovnurin hevur fólkini.